## Føstulávint í Mentanarhúsinum



Nógv verður gjørt burturúr føstulávintsdansinum í Mentanarhúsinum í ár. Eingin mætari enn Spaðar 5 koma norður at spæla og við teirra breiða úrvali av góðum løgum er besti dansitónleikurin tryggjaður. Húsið verður pyntað til høvið fyri at kunna standa mát við teimum ofta flott pyntaðu grýlunum. Harafturat verða vinningar til flottastu kvinnuligu og flottastu mannligu grýluna, eins og ein eyka vinningur. Flottastu grýlurnar hava møguleikan at vinna 2 vikuskiftispass til G! festivalin ella 2 til Við Múrin – Føroya feitastu festivalar! Eykavinningurin er frá Føroya Bjór. Hetta kvøldið verður opið í Mentanarhúsinum til kl. 5, so øll skuldu havt møguleikan at dansa seg pøstan áðrenn føstu.

# Javnaðarflokkurin hóttir við at slíta samgonguna

**Nú er samgongan komin í sína fyrstu stóru kreppui. Kreppan hevur tikið seg upp nú Javnaðarflokkurin hevur gjørt av at blokera øll politisk mál hjá samgonguni, til meiri peningur er útvegaður til almannamálini, serliga barna- og ungdómsøkið**

SAMGONGUKREPPA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Samgongan er nú komin í sína djúpastu kreppu síðani hon varð stovna fyri fýra mánaðum síðani.

Kreppan er so djúp, at Javnaðarflokkurin hevur enntá hótt við at slíta samgonguna.

Tað ger flokkurin, tí hann góðtekur ikki tær ymsu sparingarnar, sum seinastu tíðina eru settar í verk á almannaøkinum.

Sparingarnar, sum hava verið nógv umrøddar seinastu vikuna, hava loypt øði í nógvastaðni, bæði í almenninginum, hjá avvarðandi at brekaðum og sjúkum, hjá fakfeløgum og hjá áhugabólkum, sum vara av ymsu bólkunum, ið eru raktir av sparingunum.

Tað byrjaði síðsta vikuskiftið, tá ið Sosialurin avdúkaði, at heimið fyri aspergarar í Pætursgøtu í Havn skuldi lata aftur.

Síðani hava Kringvarpið og aðrir miðlar eisini drigið aðrar sparingar fram í ljósið, eitt nú at familjudeildin á Barnaheiminum verður niðurløgd sum samdøgursstovnur og hereftir bara skal vera eitt dagtilboð.

### Javnaðarflokkurin kroystur

Javnaðarflokkurin følir seg so kroystan av øllum hesum sparingunum, at hann nú hevur kallað samgonguna saman til fund, ið beinleiðis mugu kallast kreppufundur.

Har hevur Javnaðarflokkurin kravt, at meiri peningur verður útvegaður til almannaøkið, serliga til barna- og umgdómsøkið.

John Johannessen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum, hevur onga viðmerking til málið.

Tað einasta, hann vil viðganga, er, at samgongan er í eini tilgongd, har allir hesir spurningarnir eru til viðgerðar.

### Blokera øll politisk mál

Men frá álítandi keldum í samgonguni hava vit fingið at vita, at Javnaðarflokkurin beinleiðis hevur sett tað fram sum eitt treytaleyst krav til samgonguna, at meiri peningur verður útvegaður til almannaøkið.

Flokkurin hevur eisini gjørt greitt, at øll onnur politisk mál verða blokerað, til meiri peningur er útvegaður til almannaøkið, serliga til barna- og ungdómsøki.

Tað skilst, tað sum serliga pínir flokkin, er, at familjudeildin á Barnaheiminum letur aftur sum samdøgursdeild.

Men keldur okkara vilja vera við, at kreftir í samgonguna eisini arbeiða við øðrum sparingum. Í hesum sambandi eru tað kreftir í samgonguni, sum vilja sleppa ætlanini at hækka studningin úr landskassanum til at byggja ellis- og røktarheim fyri at spara landskassanum útreiðslur.



*Sparingarnar, sum eru fráboðaðar á almannaøkinum seinastu dagarnar, hótta nú við at sprongja samgonguna í luftina, tí Javnaðarflokkurin krevur at samgongan útvegar meiri pening til almannaøkið, serliga barna- og ungdómsøki. Tað eru eisini kreftir í samgonguni, sum liggja ellis- og røktarheiminum í Vági eftir lívinum fyri at spara pengar*

Hetta fer serliga at raka ætlanina at byggja ellis –og røktarheimið í Vági og verður stuðulin ikki hækkaður, er mest sannlíkt, at ætlanin at byggja heimið, dettur niðurfyri, ella í besta føri verður útsett í nøkur ár.

Heldur ikki hetta vil Javnaðarflokkurin góðtaka. Kortini er flokkurin sinnaður at finna sparingar, har tað ikki rakar grundleggjandi vælferðartænastur, sum politisku keldur okkara endurgeva Javnaðarflokkurin fyri at hava tikið til á teimum politisku fundunu, ið hava verið.

### Eykajáttan ella eyka inntøkur

Javnaðarflokkurin krevur, at meiri peningur verður settur av til almannaøkið, um tað so skal vera neyðugt við eykajáttanum.

Letur tað seg ikki gera, krevur flokkurin hinvegin, at hugt verður eftir, hvussu fleiri inntøkur kunnu útvegast landskassanum.

Í hesum sambandi er spurningurin um tollfrítt tubbakk og tollfrítt rúsdrekka aftur farin at spøkja.

Tað metir flokkurin sum onki annað enn ein fjaldur stuðul til vinnulívið, sum tað ongin meining er í at varðveita við einum halli á fíggjarlógini upp á eina hálva milliard.

# Samgongan endurskoðar sparingar

**- Tað verður ikki í míni tíð sum løgmaður, at børn og ung ella heila familjur skulu verða noydd at flyta av landinum, tí at vit ikki fáa hjálpt teimum her heima, staðfestir Kaj Leo Johannesen, løgmaður**

SPARINGAR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hatta kenni eg onki til!

Kaj Leo Johannesen, løgmaður kennir onki til, at sparingarnar á almannaøkinum skulu hava rakt Javnaðarflokkin harðari enn hinar báðar flokkarnar í samgonguni.

Hann staðfestir, at øll samgongan, sum hon er, er ógvuliga stúrin um tær sparingar, sum eru fráboðaðar á almannaøkinum.

- Tað er tungt at spara og øll samgongan fer at gera tað, hon er ment at sleppa øllum so snikkaleysum undan sparingum, sum tilber.

Hann váttar eisini, at nógv fundarvirksemi hevur verið í samgonguni seinastu dagarnar fyri at kann eftir, hvussu møguligar sparingar kunnu raka teir veikastu bólkarnar í samfelagnum sum minst.

- Tað sigur seg sjálvt, at ongin flokkur í samgonguni fer at góðtaka, at børn, ung ella heilar familjur skulu vera noydd at flyta av landinum, tí at vit ikki kunnu hava tey her heima.

- Tað verður ikki í mínari tíð sum løgmaður, leggur hann afturat.

Løgmaður sigur, at hetta er spurningurin, sum øll samgongan situr og viðgerð í hesum døgum.

Men tað fyrsta, sum samgongan er farin undir, er at viðgera tær sparingar, sum nú hava verið.

- Vit hava fingið frágreiðingar frá flokkunum og frá almannamálaráðnum og vit hava lurta eftir atfinningum. Tá ið so er, eiga vit altíð at kunna viðgera málið og í løtuni endurskoðar samgongan sparingarnar fyri at vita, hvat er at gera.

Hann sigur, at eykajáttanir kunnu koma upp á tal, men so skulu sparingar finnast á øðrum økjum. Kannað verður eisini, hvørjir inntøkumøguleikar kunnu vera.

- Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum arbeiðir eisini við einum samlaðum pakka, sum skal verða klárur seinni í vár.

Hesin fíggjarpakkin fer at viðgera sparingar og møguleikar fyri eyka inntøkum og hann fer eisini at viðgerða, hvussu vit sleppa undan hallinum á fíggjarlóigini hesi næstu trý til fimm árini.

Hann sigur, at so leingi samgongan arbeiðir við málinum, vil hann ikki siga nakað sum helst um, teir møguleikar, sum eru.



*Kaj Leo Johannesen, løgmaður, váttar, at samgongan situr í hesum døgum og endurskoðar ætlaðu sparingarnar á almannaøkinum, men úrslitið kann hann onki siga um enn*